LOYVISNEVNDIN

**Kunning til allar kommunur um matstovu- og skeinkiloyvi o.a.**

Við matstovulógini (løgtingslóg nr. 183/2018 um matstovu- og gistingarhúsvirksemi) er reglurnar um skeinkiloyvi fluttar úr rúsdrekkalógini og yvir í matstovulógina. Samstundis eru matstovuloyvini flutt frá politinum til Loyvisnevndina.

Ein onnur týðandi broyting er, at tað nú verður skilt ímillum ymisk sløg av virksemi: Matstova, kafé, diskotek, vertshús og mentanarhús.

Hetta merkir, at krøvini eru ymisk, alt eftir slag av virksemi. Matstovur og kaféir skulu, eins og frammanundan, løggildast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni, tí meginendamálið er at borðreiða við mati. Diskotek, vertshús og mentanarhús, t.d. sjónarleikarhús, samkomuhús og bygdarhús, skulu hinvegin skrásetast hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, tí meginendamálið er at skeinkja rúsdrekka.

Avgerandi broytingin í mun til reglurnar frammanundan er sostatt, at diskotek, vertshús og mentanarhús ikki longur skulu hava matstovuloyvi fyri at fáa skeinkiloyvi.

Umsóknarmannagongdirnar eru eisini broyttar.

Tá søkjast skal um matstovuloyvi, skal umsøkjarin sjálvur fáa til vega øll skjøl. Hetta merkir, at tað verður ikki longur politiið, sum sendir kommununi umsóknina at viðgera; umsøkjarin biður kommununa um kravdar váttanir, og síðani verður umsóknin send Loyvisnevndini. Yvirlit yvir skjølini er niðast í hesum skrivi.

Av serligum áhuga fyri kommunurnar eru hesi viðurskifti:

**Brunaváttan**
Við brunaváttanini, sum kommunan útflýggjar umsøkjaranum, váttar kommunan, at hølini lúka øll krøv til brunatrygd (sløkkiútgerð, rýmingarvegir o.a.). Samstundis skal kommunan áseta mesta tal av gestum (sí § 2, stk. 2, í matstovulógini).

**Umhvørvisváttan**
Við umhvørvisváttanini, sum kommunan útflýggjar umsøkjaranum, váttar kommunan, at øll umhvørvisviðurskifti (kloakering, feittbrunnur o.a.) eru í lagi (sí § 2, stk. 2 í matstovulógini).

**Matarsøla frá føstum sølustað (take-away matarsøla, catering o.tíl):**
Sum nakað nýtt hava kommunurnar fingið greiða heimild at áseta umhvørviskrøv til matarsølu frá føstum sølustað (take-away matarsølu, catering o.tíl.), sbr. § 1, stk. 3, nr. 7 í matstovulógini. Útgangsstøðið er, at loyvi til hetta virksemið bara kann latast, um viðurskiftini eru í lagi; hetta kann kortini verða trupult at gjøgnumføra, um talan er um virksemi, sum er í gongd, og tí er í § 25, stk. 4 í matstovulógini sett inn ein skiftisregla: *Virksemi, nevnt í § 1, stk. 3, nr. 7, skal lúka tær treytir, sum kommunan setur sambært hesi løgtingslóg og lóggávuni annars fyri 1. juli 2021.*

Eru spurningar ella ivamál, eru tit vælkomin at venda tykkum til Loyvisnevndina á loyvisnevndin@rusan.fo ella á telefon nr. 340400.

Vinarliga v. Loyvisnevndina
Jóanna Djurhuus, form.

## SKJALAYVIRLIT

**Tá søkjast skal um matstovuloyvi, skal umsøkjarin sjálvur fáa til vega hesi skjøl:**

Brunaváttan frá kommununi. Her verður eisini ásett mesta tal av gestum
Umhvørvisgóðkenning frá kommununi. Umhvørvisgóðkenningin er treytað av, at virksemið lýkur krøvini til m.a. kloakering
Løggilding frá Heilsufrøðililgu starvsstovuni
Alment loyvi. Politiið letur framvegis almennta loyvi. Hetta kallaðist fyrr *dansiloyvið*

**Tá søkjast skal um skeinkiloyvi, skal umsøkjarin sjálvur fáa til vega hesi skjøl:**

Fíggjarætlan fyri komandi ár ella seinast grannskoðaði ársroknskapur
Skrásetingarskjal úr Vinnuskránni
Tekningarútskrift
Váttan frá TAKS um, at persónar og felag ikki eru í eftirstøðu til tað almenna
Avrit av dóps- ella navnabrævi hjá umsøkjara og møguligum leiðara
Brunaváttan frá kommununi. Her verður eisini ásett mesta tal av gestum
Umhvørvisgóðkenning frá kommununi. Umhvørvisgóðkenningin er treytað av, at virksemið lýkur krøvini til m.a. kloakering
Løggilding frá Heilsufrøðililgu starvsstovuni
Alment loyvi. Politiið letur framvegis almennta loyvi. Hetta kallaðist fyrr *dansiloyvið*

Umsókin verður **ikki** viðgjørd, fyrr enn øll kravd skjøl eru latin Loyvisnevndini.